## Føddur til at neyðtaka



Josef Fritzl, sum er ákærdur fyri dráp, neyðtøku, burturflyting og incest, fekk eina harðliga viðferð frá mammu síni, tá hann var smádrongur. Tað stendur í einari frágreiðing hjá einum sálarlækna, sum hevur kannað tann ákærda. Pápin var deyður, og tann harðliga framferðin hjá mammuni gjørdi, at Josef seinni fekk trongd til at kúga kvinnur. Hann leið eisini av kynsligari órógv. Longu sum hálvvaksin gjørdi hann seg inn á gentur, og ta einu ferðina neyðtók hann eina sjúkrasystir í einari viðalund. Við sálarlæknan segði Fritzl, at hann var føddur til at neyðtaka.

## ABBA-herðindi og rørsluár

Komandi leygardag 21. mars verða árligu fimleikaframsýningarnar hjá Fimleikafelagnum Ljósinum í Høllini á Hálsi. Fyrra framsýningin við yngru liðunum er kl. 14.00, meðan hin seinna við teimum eldru er kl. 18.00. Hvør sýning varir væntandi hálvan annan til tveir tímar, og er málið at hava eitt bland av fittum og siðbundnum barna- og ungdómsfimleiki saman við úrvalsfimleiki, sum kappingarlið felagsins fara at sýna. Eins og onnur ár verður onkur serlig framsýningarseria á skránni, og tað ljóðar, at ABBA-herðindini, sum hava verið kring okkum, síðan sangleikurin, Mamma-Mia, varð gjørdur til film, eisini hava rakt okkum. Spennandi at vita, hvat ungu genturnar hava funnið uppá, eins og okkurt innslag um rørsluárið kanska eisini verður viðgjørt.

Miðlaløgfrøðingur:

# Kringvarpsstýrið má bakka

**Hóast Kringvarp Føroya stendur at vera óheft av politisku skipanini, so má tað framvegis fylgja lógunum um bygnaðin, sum merkir, at tveir tíðindaleiðarar mugu vera í Kringvarpinum. Hetta sigur Oluf Jørgensen, miðlaløgfrøðingur**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Oluf Jørgensen, miðlaløgfrøðingur, er sannførdur um, at Kringvarpið má bakka fyri landsstýrinum, tí tað má til eina og hvørja tíð fylgja lógini um Kringvarp*

Seinastu mánaðirnar hevur nógv stríð verið um Kringvarpið. Ávísir politikarar hava funnist at bygnaðinum í Kringvarpinum, har bara ein tíðindaleiðari er til tvær tíðindaeindir, sum skulu vera óheftar.

Tað seinasta, ið er komið fram í málinum, er, at stýrið fyri Kringvarpið ikki vil bakka fyri boðunum hjá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu, tí stýrið vísir á grein trý í Kringvarpslógini, sum sigur, at Kringvarpið er óheft av politisku skipanini.

- Í seinasta enda má Kringvarpsstýrið bakka, tí hóast Kringvarp Føroya er óheft politisku skipanini, so skal tað fylgja lógini. Og tá alt kemur til skarpskeringar, so hava politikararnir longra endan, sigur Oluf Jørgensen.

Hann vísir tó á, at hóast Kringvarpið skal hava tveir tíðindaleiðarar, so merkir tað ikki, at tíðindaeindirnar ikki skulu samstarva, men tað merkir, at tað skulu vera tveir ymiskir persónar, sum skulu hava ábyrgdina av tí, sum fer út í luftina, hóast eindirnar báðar hava gjørt kanningararbeiði saman, sum er upplagt, tá talan er um sama stovn.

Somuleiðis gevur Oluf Jørgensen Bjørn á Heygum partvís rætt, tá hann sigur, at landsstýrisfólkið er í eini støðu, har ávirkan og ábyrgd ikki fylgjast, men hetta merkir ikki, at Kringvarpsstýrið kann gera sum tí lystir, tí tað skal fylgja lógini.

- Men eg skilji væl sjónarmiðini hjá stýrinum fyri Kringvarpið, tí teir skulu sjálvandi taka síni fíggjarligu atlit, sigur hann.

### Óheftni

Oluf Jørgensen leggur stóran dent á munin millum programvirksemi og bygnað.

- Tað, sum hevur mest at siga, er, at tað ongantíð verða politikarar, sum ávirka, hvat fer út í luftina. Hinvegin má tað sjálvandi vera politiska skipanin, sum heldur stýr á, hvussu bygnaðurin hjá einum stovni hjá landinum er. Í hesum førinum er tað ein spurningur um bygnað, og tí er tað landið,ið eigur avgerðarrættin, sigur miðlaløgfrøðingurin. Hann greiðir somuleiðis frá, at so leingi tað er Kringvarpsgjald, sum er oyramerkt, ið fíggjar virksemi hjá stovninum, so koma politisk áhugamál ikki at ávirka tíðindaflutningin.

### Lýsingar

Eisini hevur nógv rumbul verið kring lýsingarvirksemið hjá Kringvarpinum, serliga Torbjørn Jacobsen, tingmaður, hevur tosað hart um hetta, men tað heldur Oluf Jørgensen vera í lagi, um tað ikki ávirkar redaktiónella tilfarið.

- Tað er góðtikið í heiminum, at public service stovnar eru partvís ella heilt fíggjaðir av lýsingarpengum, men tá er tað serstakliga týdningarmikið, at hetta á ongan hátt ávirkar tíðindaflutningin. Tað er tað sama við politisku skipanini, sum heldur ikki má ávirka tilfarið, tí markið gongur í veruleikanum ímillum strukturin og programtilfar, sigur Oluf Jørgensen. Hann vísir tó á, at í einum lítlum samfelagi har øll lutfall eru rættiliga smá, so er stórur vandi fyri, at ein fyritøka, ið letur nógvar lýsingar kann fáa ávirkan á, hvat verður varpað út. Og tá sigur Oluf Jørgensen, at tað er sera týdningarmikið, at mann beinanvegin rópar hart, at okkurt er galið.

# Landsstýriskvinnan samd við løgfrøðingi

**Helena Dam á Neystabø arbeiðir við einari samlaðari loysn fyri miðlar, men hon leggur dent á, at hetta ikki verður loyst eftir einum degi. Tó er hon sannførd um, at tað ber til at fáa Kringvarpsstýrið at fylgja lógini**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Landsstýriskvinnan í mentmálum Helena Dam á Neystabø hevur í longri tíð arbeitt við Kringvarpinum, og hon er sannførd um, at stýrið og hon fara at finna ein nøktandi loysn um tíðindadeildirnar*

Helena Dam á Neystabø er samd við Oluf Jørgensen, at Kringvarpið má fylgja lógini, og tað er eisini tað, hon hevur roynt at gera vart við. At stýrið er ósamt, er nakað, ið skal loysast á einum fundi við Kringvarpsstýrið.

Hon greiðir somuleiðis frá, at mentmálaráðið arbeiðir við einum Kringvarpsskatti, sum skal broyta gjaldið fyri Kringvarpið, soleiðis, at tað verður ein progressivur skattur. Hesin kann sambært Helenu Dam á Neystabø verða klárur í hesum árinum.

- Tað er bestemt ikki ætlanin hjá mær at oyðileggja nakað fyri Kringvarpið. Vit eru komin í eina fløkta støðu, sum harðligur retorikkur bara hevur gjørt verri, og nú er tað vorðin mín ivasami lutur at loysa hesa støðu, sigur Helena Dam á Neystabø.

### Lýsingar

Hon leggur afturat, at viðvíkjandi lýsingunum er hon samd við blaðútgevarafelagnum, sum millum annað í skrivið sigur, at havandi í huga, at Kringvarp Føroya bæði krevur hyggjara- og lurtaragjald, umframt at stovnurin hevur loyvið til spæl, má ásannast, at torført er at kappast við hendan stovn um lýsingarnar.

Tí heldur blaðútgevarafelagið, at tað er sera óheppið fyri privatu miðlarnar, at tað almenna kringvarpið er byrjað at gera stór inntriv í lýsingarmarknaðin.

Hóast Helena Dam á Neystabø er samd við blaðútgevarafelagnum, so dugir hon ikki at síggja, hvussu Kringvarpið skal niðurlaga lýsingarnar í løtuni, tí Kringvarpið fær ikki nóg mikið av peningi.

### Loysnir

Landstýriskvinnan sigur, at hetta er eitt stórt og fløkt mál, sum ikki kann loysast frá degi til annan, og tí ætlar hon at nýta ta tíð og ta orku, sum er neyðug fyri at fáa eina loysn, sum hevur við sær, at miðlarnir kunnu yvirliva, og at ein passalig javnvág verður á økinum. Ein møguleika til hetta heldur Helena Dam á Neystabø vera, at tá farið verður í gongd við public service sáttmálan, kann ein loysn finnast fyri øll hesi viðurskifti.

Helena Dam á Neystabø er blivin kritiserað fyri ikki at hava funnið nóg mikið av peningi fram til Kringvarpið, og hesum kritikki tekur hon undir við.

- Tað ber til at kritisera meg fyri nógv økir, sum ikki hava fingið nóg mikið av peningi. Tað er bara soleiðis, at vit mugu liva við fíggjarkreppuni sum er, og so finna frægastu loysnirnar útfrá tí, sigur landsstýriskvinnan í mentamálum.